# TILTØK

SAMBAND
SIGRID TRÓNDARSON
SIGRID@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

**Gudstænastur**
**3. sunnudag eftir páskir**
***Havnar kirkja:*** Kl. 11 Sonja Klein
***Kaldbak:*** Kl 12 Marjun Lómaklett
***Sandavágur:*** kl. 11, kirkjan fyllir 90 ár, David Johannesen og Inga Poulsen Dam
***Skála:*** kl. 11 Jógvan Fríðriksson
***Funningur:*** kl. 11 messa Emil Olsen
***Gjógv:*** kl. 12.30 messa Emil Olsen
***Gøta:*** kl. 11, altarg., Martin R. Jacobsen
***Viðareiði:*** kl. 12, altarg., Elsa Funding
***Øravík:*** kl. 11, Jónsvein Bech
***Porkeri:*** kl. 12, Patrick de Neergaard

**Matiné í Havnar kirkju**
Leygardagin 28. apríl kl. 11.30 verður matiné við Sámal Petersen, violin og Ragnar Olsen, gittara. Verk eftir m.o. Bach og Giuliani.

**Meinigheitshúsið í Havn**
Mánadagin kl. 17.30 Juniormøti 5., 6. og 7. flokkur.
Týskvøldið kl. 20 Bibliutími, innleiðing til pastoralbrøvini.
Hóskvøldið kl. 20 Ungdómsmøti v. Alfred Petersen.
Leygardagin kl. 9.30 Foreldur og børn.
Sunnudagin 29. apríl kl. 14 er ommu og abbadagur í Sunnudagsskúlanum.
Sunnudagin kl. 18 Møti v. Regin Olsen, Ungdómskórið syngur.
Øll eru hjartaliga vælkomin.

**KFUM og KFUK í Havn**
Týsdagin kl. 17 í KFUK: Várgleði fyri børn.
Týsdagin kl. 19.30 í KFUM: Kristiliga sangkórið venur.
Mikudagin kl. 19 í KFUM: Tensing kórið venur.
Hósdagin 26. apríl Í KFUK: Hugnakvøld.

**Filadelfia, Landavegur 22**
Í kvøld kl. 20 Bønarskúlin
Mikudagin kl. 17 bøn fyri Ísrael og býnum, kl. 19 Delli.
Leygardagin kl. 21 Flare - luttøka frá PVH (Pinse Vekkelsens Højskole).
Sunnudagin kl. 10.45 Møti - luttøka frá PVH, kl. 11.30 sunnudagsskúlin.
www.filadelfia.fo

**Katólska Kirkjan**
Hvønn gerandisdag kl. 17.30 Messa í Kerit.
Týskvøld 24. apríl kl. 19.30 Satt lív í Guði, hevur rósukransbøn og bibliulestur í Mariukirkjuni. Øll eru vælkomin.
Flaggdagin/mikudagin kl. 11.30 Messa í Kerit.
Hóskvøldið kl. 19.30 heldur finn Arvé prestur, fyrilestur í Mariukirkjuni. »Da Vinci Loyndarmálið«. Hvat hevur tað við H. C. Andersen og Benedikt Pave at gera? Komið og hoyrið. Øll eru vælkomin.
Leygardag kl. 11.30 Messa í Kerit.
Sunnudag kl. 11 Hámessa við Finn Arvé, prestur í Mariukirkjuni. Kl. 14 Sunnudagsskúli.
www.katolsk.fo

**Missiónshúsið v/ Landavegin**
Hóskvøldið kl. 20. Møti.
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli á Norðasta Horni.
Kl. 18 Møti við Sverra Kass.

**Lívdin á Brekku 3**
Týskvøldið samlast húsbólkarnir.
Vit bjóða øllum at vera vælkomin.

**Katólska kirkjan**
Bønarløta verður týskvøldið 24. apríl kl. 19.30 í Mariukirkjuni. www.katolsk.fo

**Tórshavnar Hvítusunnusamkoma, Yviri við Strond**
Sunnudagin kl. 11 Morgunmøti, kl. 18 Evangel. møti.
Øll eru vælkomin.

**Missiónshúsið í Sørvági**
Dýrabiðidagsstevna verður í døgunum 4.-6. mai 2007. Skipað verður fyri evangel. møtum, og syngið við kvøldi, við luttøku ymsastaðni frá í landinum. Serstakt ungdómsmøti verður leygarkvøldið kl. 23. Vit bjóða vælkomin til stevnuna.

**Saron Vestmanna**
Týsdagin 24/4, seniorløta klokkan 15 - 17.
Mikudagin 25/4 Bønarmøti í Saron klokkan 20.
Sunnudagin 29/4 morgunmøti við breyðbróting kl. 11.

**Kollafjarðar Missiónshús**
Bíbiltími verður týskvøldið kl. 20.
Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Missións- og Ungdómshúsið á Glyvrum**
Mikudagin 25. apríl kl. 20 bíbiltími. Øll eru hjartaliga væl komin.

**Keldan, Skálafirði**
Hóskvøldi kl. 20, Awake.
Sunnudagin kl. 17 møti.
Barnamøti kl. 17.
Fólk frá Bíbliuskúla úr Mariager luttaka bæði kvøldini.
Vælkomin í Kelduna
www.keldan.fo

**Saron Haldórsvík**
Mánadagin 22/4 húsmøti hjá Kirstin og Eirik Samuelsen, klokkan 20.
Verið hjartaliga vælkomin.

**Siloa, Fuglafirði**
Bøn, bíbliulæra og hugnalig samvera við drekkamunni verður í Siloa mikukvøldið kl. 19.30.
Sofus Gregersen talar. Evni: Fosturtøka og heimsfatan. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Getsemane, á Brekku 19 Klaksvík**
Týskvøldið kl.19.30 er bíbliutími.
Mikukvøldið kl.20.00 er bønarmøti.
Fríggjakvøldið kl.20.30 er ungdómsmøti við Jón á Borg og Malmberg Olsen.
Leygardagin kl.10.00 er morgunbøn.
Sunnudagin kl.14.00 er møti, sunnudagsskúli er samstundis.
Hvønn gerandismorgun. kl. 6:15 er morgunbøn.

**Missiónshúsið í Skopun**
Mikudagin kl. 20 Bíbliutími, Hebr. 12, 1-17. Øll eru vælkomin.
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 18 Møti. Innsavnan til húsið.

**Frelsunarherurin, Vágur**
Mánadag kl. 20 Bønarløta.
»Alt broytist við bøn!«
Mikudag kl. 20 Heimaforbundsmøti fyri allar kvinnur!
Hósdag kl. 20 Bønarløta.
»Kom við og bið!«
Fríggjadag kl. 20 Ungdómsmøti undir heitinum »Plantan!« Ver vælkomin - hóast tit ikki eru ein partur av samkomuni, ella ikki eru von at ganga á møti.
Leygardag kl. 15 Andakt í sambýlinum í Vági.
Sunnudag kl. 11 Halgunarmøti. Kl. 14 Sunnudagsskúli. Kl. 17.30 Bønarløta. Kl. 18 Evangeliskt møti. Hallur Ludvig og Eddie Bech skipa fyri. www.frelsunarherurin.fo

**Sjómansheimið Ørkin Brautarholt 29, Reykjavík**
Hvønn sunnudag kl. 17 og fram til mai 2007 er møti á Ørkini.

**Veit okkum eina hjálpandi hond**
at seta ein grønmetis ídnað á stovn, millum tey fátæku í Rumenien.
**Ring 905699.** Kostnaðurin er kr. 100 + vanligt uppringingargjald. Kundar hjá Kall kunnu ringja. Takk fyri tína hjálpandi hond.
*Calarasi missiónin v/ Thomas J. Askham, Asbjørn Niclasen og Sverri Kjærbæk.*

**Losjan í Havn Tinghúsvegur 18**
Fríggjadagin kl. 15 hittast tilkomin og eldri til hugna.

**Tilhaldið**
*í Tórsgøtu 21, tlf. 316491*
Opið er mánadag-fríggjadag kl. 10.00-17.00
Teldup.: tilhald@torshavn.fo
***Mánadagin 23. apríl***
kl. 10-10.30 Fimleikur
kl. 11-11.45 Enskt á byrjunarstigi, eftirmeting
kl. 14-17 Kortspæl og onnur spøl
***Týsdagin 24. apríl***
kl. 10-11.30 Sangur, Simme Jacobsen. Øll eru hjartaliga vælkomin.
kl. 15 ***Niðurstøðan av verkætlanini hjá Fø. Kommunufelag, »Okkara lív sum eldri«.*** Eyðun Kristiansen, verkætlanarleiðari, Sveiney Sverrisdóttir, skrivari
***Mikudagin 25. apríl***
kl. 10-12 Tóvirkið. (Veving, maskinbinding, seyming, binding o.a. Øll eru hjartaliga vælkomin. ***Ása, Katrin, Margit og Marita***
kl. 14-17 Onki telduprát, Páll Poulsen
kl. 15-17 Opið hús
***Hósdagin 26. apríl***
kl. 10-10.30 Fimleikur, Sonja Danielsen
kl. 14-17 Boccia í kjallaranum, Alma Poulsen
***Fríggjadagin 27. apríl***
kl. 10-17 Opið hús
*Tað er altíð ein krókur í Tilhaldinum - um tygum ikki fáast við nakað ítriv. Vit ynskja at øll skulu kenna seg vælkomin.*

**Landsfelag Pensjónista**
Felagið heldur til í Tróndargøtu 13, Tórshavn. Skrivstovan er opin hvønn týsdag frá kl. 13.00-16.00. Tlf. 319394 ella 219394.
LP@email.fo

**Dagtilhaldið í Gøtubrá, Gøtu tlf. 441662**
Opið týsdag kl. 15-18.

**Tilhaldið á Toftum**
*Tlf. 448690*
*Vit halda til í niðaru hædd á Vesturskin.*
*Teldupost: tilhaldnes@post.fo*
Opið er týsdag, mikudag og hósdag. Frá kl. 15.00 – 18.00
*Vit hava hvønn dag ein góðan drekkamunn, eins og vit hava nógv spøl, og annað ítriv.*
*Vit ynskja at øll kenna seg væl og hugnað sær.*

**Dagtilhaldið Vesturskin**
***Opið er týsdag og hósdag frá kl. 15.00-18.00.***
***Týsdag*** - fimleikur
***Mikudag*** - Sangløta.
***Hósdag*** - ymist ítriv.

*Allar dagar er møguleiki at lesa bløðini og fáa sær ein góðan drekkamunn. Øll eru hjartaliga vælkomin.*

**Dagtilhaldið Fløvi**
*í Kvinnufelagshúsinum á Glyvrum tlf. 448279.*
*Allir pensionistar hjartaliga vælkomnir.*
*Opið mánadag til fríggjadag kl. 15.00 – 18.00.*
***Skrá vika 17***
***Mánadagur 23. apríl.***
Fimleikur. Felagssangur.
***Týsdagur 24. apríl.***
Opið hús.
***Mikudagur 25. apríl.***
Flaggdagin er dagtilhaldið stongt.
***Hósdagur 26. apríl.***
Opið hús.

**V4**
**Dráttur nr. 1684, tann 21. apríl 2007**

0 - 11 - 12 - 15 - 18 - 19 - 27 - 29 - 33 - 34 - 45 - 63 - 64 - 73 - 81 - 84

**Ein vinnari**
Snars. nr 3678721 (Kiosk Activ)

**Eykavinningar**
Tríggir ferðaseðlar frá Atlantsflog.
Snars. nr 3654389 (FK Hoyvík)
Snars. nr 3659657 (Svalin Sp/f)
Snars. nr 3654358 (FK Hoyvík)

**Konfirmatión**
Sunnudagin 29. apríl konfirimerast í Emmersbæk kirkju Katrin Nina Berg dóttur Oluffu Djurhuus Berg og Edmund Berg Pilevænget 10 9850 Hirtshals.

**60 ár**
Týsdagin 24. apríl verður Jóannes S. Hansen, Saltangará, 60 ár. Føðingardagurin verður hildin í Berøa kl. 19. Øll vælkomin.

**80 ár**
Týsdagin 24. apríl, verður Adelheid Joensen, Klaksvík, 80 ár. Dagurin verður hildin saman við børnunum.

**Brúdleyp**
Leygardagin 28. apríl kl 15 giftast í Hebron á Argjum Marianna á Dul og Bjarni Fríðberg, bæði av Argjum. Móttøka verður í Hebron eftir vígsluna. Veitslan verður fyri innbodnum í Pálsstovu kl 19.

Leygardagin 28. apríl giftast Beinta Olsen úr Saltangará og Ingi P. Jacobsen úr Søldafirði. Vígslan verður í Rituvíkar kirkju kl. 13.00 og døgurði fyri innbodnum í Bygdarhúsinum í Leirvík kl. 17.00. Vælkomst við kakum og kaffi verður kl. 20.30 - eisini í Bygdarhúsinum í Leirvík - øll hjartaliga vælkomin.



**Beinta og Ingi.**

Leygardagin 5. mai kl.14.00 giftast í Kelduni í Skálafirði Noomi Káradóttir Jacobsen og Rúni Rasmussen, Tórshavn. Veitslan verður fyri innbodnum í bygdarhúsinum í Leirvík kl.19.00.

Leygardan 12. mai kl. 13 giftast í Evangeliihúsinum í Tórshavn Eydna Christiansen og Jón Johannesen, bæði úr Tórshavn. Móttøka verður í Evangeliihúsinum frá kl. 14 til kl. 18, og øll eru hjartaliga vælkomin.

Leygardagin 19. mai kl. 15.00 giftast í Fríðrikskirkjuni Susan Janusardóttir og Øssur Hansen, Toftir. Veitslan verður á Svangaskarði kl. 19. Tey, ið vilja gleða okkum við at koma, verða biðin um at tekna seg á tlf. 449131 ella 507381 áðrenn 20. apríl.

Leygardagin 9. juni kl. 16.00 giftast í Vágs kirkju Sarina Augustinussen, Vágur og Hans Andrias Thomsen, Vágur. Veitslan verður í VB-húsinum kl. 19.00. Tey ið vilja gleða okkum, við t koma verða vinarliga biðin um at tekna seg á tlf. 373938, 373073, 373294 áðrenn 20. mai.

Leygardagin 30. juni giftast Christianskirkjuni kl. 15.00 Bryndis G Petursson og Jóhan Simonsen, Klaksvík. Veitslan verður hildin í Skálanum kl.19.00 Tey ið vilja gleða brúðarparið at koma, verða biðin um at tekna seg á tlf. 456270, 227172, 224765 ella e-mail: bryndisp@post.olivant.fo áðrenn 11. juni.

Leygardagin 14. juli giftast Fríðunn Jónolvsdóttir úr Vestmanna og Vermund Vestergaard úr Vági. Vígslan verður í Vágs kirkju klokkan 16. Veitslan verður hildin í VB-høllini klokkan 19. Tey ið vilja gleða brúðarparið við at koma, verða biðin um at tekna seg á telefon: 229756, 273484, 424499 ella 373746 áðrenn 30. juni.

11. august giftast í Miðvági Jonrid Mikkelsen, Tórshavn og Fróði Clementsen, Tórshavn. Brúdleypið verður hildið í SÍF-húsinum. Tey, ið vilja gleða okkum við at koma, verða biðin um at tekna seg á tlf. 332800 ella 511331 áðrenn 1. juli.

**Silvurbrúdleyp**
Mánadagin 11. juni 2007 hava Gunnvør og Petur Thomsen, Madumsøvej 4, Hellum, 920 Skørping silvurbrúdleyp. Dagurin verður hildin leygardagin 23. juni kl. 18. í Veddum forsamlingshus. Tey, ið ynskja at gleða okkum við at koma, kunnu tekna seg áðrenn 1. mai 2007 á tlf. 0045 98398339.



Týsdagin 24. apríl hava hjúnini Katrin & Markus Tummas Jacobsen, Klaksvík, silvurbrúdleyp, opið hús verður frá kl. 18.00 í heiminum á Gravarbø.

**Gullbrúdleyp**
Mikudagin 9. mai hava Ása og Olaf Nielsen í Havn, gullbrúdleyp. Dagurin verður hildin fríggjadagin 11. mai kl. 19 í Bygdarhúsinum í Leirvík. Tey ið vilja gleða okkum við at koma, verða vinarliga biðin um at tekna seg á tlf. 312175 innan leygardagin 5. mai.

Fríggjadagin 11.5.07 hava Alvilda og Harry Joensen, Klaksvík gullbrúdleyp, dagurin verður hildin sama dag í Skálanum kl. 18. Tey ið vilja gleðast saman við okkum henda stóra dag verða vinarligast biðin um at siga frá innan 2.5.07 á tlf. 457044 - 319041 ella 321144.